

*Landstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, fer at leggja fram uppskot um at hava sama fiskidagatal komandi fiskiár. Hann gongur tískil ímóti tilmælunum hjá ICES og føroysku fiskifrøðingunum*

# Landsstýrið mælir til sama fiskidagatal

**Hóast ICES og føroyskir fiskifrøðingar mæla til at skerja fiskidagatalið, so mælir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kortini til sama fiskidagatal sum í hesum fiskiárinum.**

FISKIDAGATAL
*Páll Holm Johannesen*

Eitt av málunum, ið var til umrøðu á landsstýrisfundi mikudagin, var spurningurin um hvussu stórt fiskidagatalið skal verða fyrikomandi fiskiár. Landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sigur við Sosialin, at landsstýrið fer at mæla til sama fiskidagatal sum í hesum fiskiárinum.

### Fiskifrøðingar meta veiðitrýstið verða ov stórt

Uppskotið hjá Jacob Vestergaard gongur sostatt ímóti metingunum hjá bæði føroysku fiskifrøðingum og ICES, sum siga, at veiðitrýstið undir Føroyum er alt ov stórt.

Fiskirannsóknarstovan mældi politikkarunum til í juni-mánað at skerja fiskidagatalið eftir toski á landgrunninum og eftir hýsu og upsa undir Føroyum við 25 prosentum. Fiskirannsóknarstovan metti, skerjingin av fiskidagatalinum skuldi gerast yvir tvey ella trý ár.

### Ein millumloysn

Spurdur, um hví hann gongur tilmælunum frá ICES og føroysku fiskifrøðingunum ímóti, svarar Jacob Vestergaard, at hann eisini hevur tikið tilmælini hjá fiskidaganevndini og einum íslendskum serfrøðingi við í endaligu avgerðina.

Fiskidaganevndin mælir til sama fiskidagatal, meðan íslendski serfrøðingurin, sum Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarfelag og Føroya Reiðarafelag hava ráðført seg við, heldur, at fiskidagatalið kann økjast.

– Av øllum tilmælum, eg havi fingið, havi eg valt eina millumloysn, sigur Jacob Vestergaard.

Um løgtingið hósdagin eftir ólavsøku fer at samtykkja uppskotið er ein onnur søga. Í fjør varð tilmælið hjá táverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen broytt við 0,1 prosenti í løgtinginum. Fiskiárið byrjar 1.september.

# Inga Poulsen Dam heldur ólavsøkuprædikuna

**Ólavur Rasmussen hevur boðað bispi frá, at hann verður ikki á prædikustólinum á ólavsøku. Næst í røðini er Inga Poulsen Dam, sum fer at halda ólavsøkuprædikuna í ár.**

ÓLAVSØKUPRÆDIKA
*Páll Holm Johannesen*

Eftir, vit í blaðnum í gjár vístu á, at ivi hevði stungið seg upp um, hvør skuldi halda ólavsøkuprædikuna í ár, hevur bispur nú kunngjørt, at tað verður Inga Poulsen Dam, prestur í Norðurstreymoyar Prestadømi, sum fer at halda ólavsøkuprædikuna í ár.

Ólavur Rasmussen, prestur í Suðuroyar Sunnara Prestadømi var annars fremst í røðini at halda prædikuna, men hann hevur borið seg undan, og tískil er heitt á Ingu Poulsen Dam, sum er næst røðini. Inga Poulsen Dam hevur verið prestur síðan 1994. Frá 1994 til 97 starvaðist hon í Suðurstreymoyar eystara prestadømi. Síðan var Inga eitt stutt tíðarskeið á Sandi, og frá 1. juli 2001 hevur hon verið prestur í Norðurstreymoyar Prestadømi.

Bispur vísir á, at vanlig mannagongd er , at um ein prestur ber seg undan, so er tað eykamaðurin, sum traðkar til.

### Hvalvíksprestur komandi ár

Hans Jacob Joensen sigur, at komandi ár verður tað nýggi hvalvíkspresturin, Mogens Tilsted Christensen sum skal halda prædikuna. Verður eingin nýggjur prestur settur fram til 2005, so verður byrjað av nýggjum. Elsti prestur í løtuni er Niels Pauli Danielsen, sum verður næst hvalvíkspresti at halda ólavsøkuprædikuna, um eingin nýggjur er settur til tað tíð.



*Bispur hevur nú kunngjørt, at Inga Poulsen Dam verður á síggja á prædikustólinum ólavsøkudag. Lík er sostatt til, at bæði Inga og Marjus koma at hava úr at gera á ólavsøku, tí sum kunnugt skal Marjus eisini vera við til tingsetuna*

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni:

# Skilabetri at skert fiskidagatalið

**Hjalti í Jákupsstovu vísir á, at verður uppskotið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum samtykt, so er vandi fyri, at gýtingarstovnurin hjá serliga toski kemur undir eitt lágmark, sum kann hava við sær, at hann fer at fáa trupulleikar at koma uppaftur.**

FISKIDAGATAL
*Páll Holm Johannesen*

Fiskirannsóknarstovan var ein av stovnunum, sum fyri góðum mánað síðan, mældi til at skerja fiskidagatalið, tí veiðutrýstið var ov stórt. Nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eftir ólavsøku fer at leggja fram uppskot um, at varðveita sama fiskidagatal komandi fiskiár, hevur Jacob Vestergaard sostatt valt at ganga tilmælinum hjá fiskirannsóknarstovuni ímóti.

Stjórin á fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, heldur tað hevði verið skilabetri at skert fiskidagatalið, enn hildið fast um sama tal sum í hesum fiskiári.

– Um uppskotið verður samtykt, so er tað ikki nøkur katastrofa her og nú, men tað kemur at hava við sær, at sveiggini verða nógv størri á toskastovninum komandi árini, enn um, man valdi at skerja fiskidagatalið komandi fiskiár, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Stjórin á Fiskirannsóknarstovuni vísir á, at vandi er nú fyri, at gýtingarstovurin serliga hjá toski kemur undir eitt lágmark, sum fer at hava við sær, at stovninum væl kann fáa trupulleikar at koma uppaftur. Hjalti sigur seg kortini ikki vita heilt nær lága markið er nátt, og tí kemur bara tíðin at vísa, hvørjar avleiðingar uppskotið hjá Jacob Vestergaard kemur at hava fyri stovnin, sigur Hjalti í Jákupsstovu at enda.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Túna samkoma fyri 620 fólkum

Seinnapartin í dag verður familjusamkoma fyri teimum, sum eru ættað úr Túni á Toftum. Umleið 620 hava teknað seg til samkomuna, sum verður í ítróttarhøllini á Skála. Tað verður lagt fyri klokkan 17, og tey ætla at runda av onkra staðni millum klokkan tíggju og ellivu.

Tað eru eftirkomararnir hjá Yngra Hanusi, sum var føddur í 1817, og Jóhonnu, sum var fødd í 1822, ið fara at hittast. Tey bæði giftust inn í Túna húsini, og tey fingu níggju børn.

Hanus, sum var elstur, doyði heilt ungur, og so vóru tey Thomas Elias, Súsanna Catrina, Jógvan, Anna Maria, Justinus, Jóhanna, Hanus og Johan. Seks av eftirkomarunum hjá hesum standa sum innbjóðarar til samkomuna, sum verður í dag. Tey eru Jóannes Rubeksen, sum er eftirkomari hjá Thomas Eliasi, Elinborg Solmunde, sum er eftirkomari hjá Onnu Mariu, Josefina Jacobsen, sum er eftirkomari hjá Justinusi, Flóvin Jacobsen, sum er eftirkomari hjá Jóhonnu, Jovina Højgaard, sum er efirkomari hjá Hanusi, og Emil Hansen, sum er eftirkomari hjá Johan.

Josefina Jacobsen sigur, at eini tjúgu fólk eru komin úr Noregi til samkomuna, og úr Íslandi er eitt par komið. Eitt sindur misjavnt er tað, hvussu stór undirtøkan hevur verið millum ymsu greinarnar av familjuni, men eftirkomarar hjá øllum átta børnunum, sum bóru ættina víðari, vera við. Elsti luttakarin er 93 ára gamal.

Í sambandi við samkomuna í dag hava Torleif Hansen og Josefina Jacobsen savnað tilfar um familjuna, sum luttakararnir fáa í einum hefti. Her verður greitt frá familjuni fram til ferminingaliðið ella til oldurommu og oldurabba børnini hjá Jóhonnu og Hanusi.

Lagt verður fyri við at syngja Nú leiti eg til tína náði, sum er sálmurin, ið ofta varð sungin, tá ið teir fóru til útróðrar. Yngri



*Josefina Jacobsen er ein av teimum, sum er við til at fyrireika Túna samkomuna, sum verður í dag*

Hanus fórst saman við soninum Thomas Eliasi og trimum øðrum, tá ið Túna báturin Duen gekk burtur stóra skaðadagin 30. apríl 1870. Í Keraldinum nr. 6 í 2001, greiðir Torleif Hansen frá um Túna familjuna, og har sigur hann, at eftir skaðadagin 30. apríl í 1870 sótu tríggjar einkjur í Túni: mamma Hanus, Súsanna, sum var 84 ára gomul, kona hansara, Johanna, sum var 47 ára gomul, og Julia, sonarkonan, sum var 21 ára gomul. Ætlanin er, at samkoman við tøgn skal minnast teir og tey, sum eru farin.

Umframt frágreiðingar um ætt og søgur um Túna húsini og ættfólkini, so verður sangur og tónleikur á skránni, sum fer at verða framført av eftirkomarum. Ein sangur er yrktur júst til hetta høvið, og ein sangur, sum Adolf Hansen, sáli, yrkti, tá ið partar av familjuni vóru saman í 1988, verður eisini sungin.

Ein steðgur verður soleiðis at tað fer at bera til hjá fólki at heilsa upp á og tosa saman. Tað ber eisini til at møta, áðrenn sjálv samkoman byrjar, og tað fer at bera til at steðga á eina løtu, eftir at samkoman verður liðug.

Gamlar og áhugaverdar myndir vera at síggja, og tað verður skipað fyri upptøku, bæði video ella dvd og myndum.

## Petur Baldvinsson 60 ár



Hósdagin 24. juli fylti Petur Baldvinsson í Havn 60 ár. Petur er havnarmaður við stóra H. Hann er sonur Emely Hansen, dóttir Rasmus í Funningsstovu í Havn, og Sigmund Baldvinsson, vanliga nevndur "Simbe", úr Klaksvík, búsitandi í Íslandi. Emely doyði í 2001, 76 ára gomul, og Sigmundur doyði í fjør, 86 ára gamal, í Íslandi. Petur lærdi til bakara í Køkubúðini, hjá Andreas Jacobsen í Havn, seinni fór hann til Íslands, har hann lærdi til kondittara. Tá hann kom aftur úr Íslandi, sigldi hann í nøkur ár, til hann fekk arbeið á bakarínum hjá Frants Restorff í Havn. Hann hevur eisini arbeitt á bakarínum hjá Gunnleivi. Seinnu árini hevur hann arbeitt hjá Tórshavnar Kommunu sum vegmaður. Petur heldur við B36 og Manchester United, tá tað gongst hesum liðum væl, hevur Petur tað gott. Sum ungur spældi hann í álopinum hjá B36, bæði á dreingjaliðnum og í 1. deild. Hann mátti gevast, tá hann fekk eina skaða í knæið. Hann er framvegis ein av trúgvu áskoðarunum hjá B36 og fylgist eisini við liðinum til dystir úti um landið. Petur eigur trý børn, eina dóttir sum býr í Keypmannahavn og ein son og eina dóttir sum búgva í Havn.

## Kári Mouritsen 60 ár

24. juli fylti Kári K. Mouritsen í Havn 60 ár. Kári er sonur Giggu, f. Joensen, og Carl Mouritsen í Havn. Sum ungur spældi hann á tí dreingjaliðnum hjá B36, sum vórðu føroyameistarar í 1962. Hann er eisini kendur sum gittarspælari og sangari í Faroe Boys og Harkaliðnum. Hann koyrdi á bilstøðini Taxa í 60-unum, áðrenn hann flutti til Danmarkar í 1967. Kári er útbúgvin prentmyndasmiður (kemigrafur), og hevði ymisk arbeiðir í Danmark, áðrenn hann flutti heim aftur til Føroya at búgva. Hann hevur koyrt sum bilførari á bilstøðini Auto í



Havn síðan 1988. Kári eigur sonin, Boga, og dóttrina, Katrin, sum búgva í Danmark.

## Dagurin

25. juli. Jákupsdagur. Dagurin verður hildin til minnis um tann ápostulin, sum verður róptur *Jákup tann Eldri*. Hann var sonur Sebedeusar og bróðir Jóhannesar. Hann var tann fyrsti av ápostlunum, sum varð tikin av døgum fyri trúgv sína (Ápostlasøgan 12, 1-2).

### Minningarorð um okkara kæra gubba

# Jógvan Ólason



28. apríl andaðist gubbi 61 ára gamal.

Lungnasjúkan, sum gubbi stríddist við, versnaði spakuliga tey seinastu árini. Páskadag bleiv hann innlagdur. Teir fyrstu dagarnar livdu vit øll í vónini um, at hann fór at fáa tað betur, men teir seinastu dagarnar gekk tað bara ein veg.

Orsakað av sjúkuni valdi gubbi at gevast sum lærari, áðrenn hann fylti 60. Hann var lærari við stórum L. Hann gekk ótrúliga høgt upp í sítt arbeiði, og fylgdi næmingunum leingi eftir, at teir vóru lidnir við fólkaskúlan. Hann var ein strangur lærari, tað vil siga ein lærari, sum kravdi nakað av sínum næmingum, og hann kravdi at teir lurtaðu eftir. Men samstundis var gubbi eisini ein lærari við kenslum. Var tað endaliga úrslitið hjá einum næmingi ikki gott, tók gubbi sær tað ógvuliga nær.

Gubbi hevði seyð í nógv ár. Hetta gingu mostur og gubbi høgt uppí, serliga tá lembingin nærkaðist. Tá var serligt eftirlit við hvørjari ær. Og ofta ringdu tey at fortelja, at nú var eitt lamb komið afturat. Tað stuttligasta við lombunum var, tá tey skuldu út á bøin. At síggja, hvussu tey tóku tey fyrstu fetini í skervinum uttan fyri seyðahúsini, tað stuttleikaðu við okkum øll við.

Um sumrarnar hoyggjaðu mostir og gubbi tað, sum tey áttu av bøi. At sleppa við í bøin hesa tíðina dámdi serliga Magdalenu ógvuliga væl. Áðrenn farið var, gjørdi mostir drekka og mat klárt, og gubbi ornaði rívur, og tað sum har til hoyrdi. Útvarpið var eisini altíð við, tí báðum dámdu teimum væl at lurta eftir tónleiki. Sín kærleika til tónleika vísti gubbi ein av síðstu døgunum, hann var millum okkum. »Mítt føðiland« ljómaði í útvarpstólinum. Hetta er eitt av mongu løgunum, gubbi helt sera nógv av, og sjálvt um hann ikki var heilt klárur, so megnaði hann undrunarvert at syngja við.

Gubbi og Solberg høvdu bát saman í fleiri ár. Teir vóru mangan á floti saman, og gubbi brúkti nógvar tímar at umvæla og snøgga um bátin. Orsakað av heilsuni seldu teir bátin fyri nøkrum árum síðani, men teir báðir vóru nógv saman líka til tað síðsta. Onkuntíð kundi man síggja teir fara ein túr á hvør sínum prutli. Eingin ivi um, at saknurin er stórur hjá Solberg, nú gubbi ikki er meira.

Gubbi og mostir hava altíð verið góð við okkum. Frá tí degnum vit komu til verðina, hava tey verið sum okkara foreldur. Søgdu mamma og babba nei til okkurt, so fóru vit bara oman til mostur og gubba. Thomas og Andreas hava eisini altíð sagt luffomma og luffabbi við og um mostur og gubba. Mangar leygarmorgnar og sunnumorgnar plagdi gubbi at ringja suður at práta við teir. Teir sakna luffabba, og serliga Andreas er enn viðhvørt illur við Jesus pápa. Thomas var í feriu, tá gubbi doyði, og hann er ræðuliga ringur um, at hann ikki náddi at siga farvæl. Men teir hava fingið at vita, at teir gott kunnu práta við hann, tí hann hoyrir teir.

Mostir, teir seinastu dagarnar á hospitalinum vísti gubbi týðuliga, hvussu góður hann var við teg. Sjálvt um hann óivað eisini hevur verið glaður fyri, at næstan øll familjan var um hann, so var tað alla tíðina tær hann spurdi eftir. Mostir, tú veitst, at vit eru her, og vit vilja altíð hjálpa tær!

Vit vilja við hesum lýsa frið yvir minnið um kæra gubba okkara Jógvan Ólason.

**Magdalena, Jóhan og Súnfríð**